sosialurin telf. 14720. 11820
box 76, 3800 Tórshavn
Útgevari: p/f sosialurin
Fyritaks- og blaðstjóri: Tórfinn Smith (ábyrgd)
Blaðmenn: Høgni Djurhuus
Jóhann Mortensen
Jan Müller
Lýsingar: Arne Thomsen
Uppseting: Sosialurin
Prent: Dimmalætting

Tá hevndarhugurin er fremri enn samfelagssinni

TAÐ VAR ein óhugnaligur deymur eftir at hava lisið Dimmalætting týsdagin, har høvuðspennur sambandsins ger greitt, at nú skal skrúvast fyri so tað munar. Fólkið skal merkja tað fyri alla framtíð. Farma- og ferðaflutningssiglingin við framtíðarskili í skal með alla undir flag. Við brestin skal seljast út av framtíðarætlanum føroyinga.

HENDAN SKRIVING er ikki at misskilja. Nýggja landsstýrissamgongan er longu gjørd, og áhugavert er at síggja hvussu teir borgarligu longu nú skera ætlanir sínar út í papp. Dupult áhugavert er, at formaður sjálvstýrisfloksins eyðsíniliga undan valinum hevur bundið seg til sambands- og fólkaflokkin, og hevur harvið frásagt sær at reka framburðspolitikk framyvir. Sjálvstýrisflokkurin segði annars undan valinum, at hann ikki var ímóti framtíðar millumlandasiglingini, — heldur ikki um hitt almenna var uppií.

JAVNAÐARFLOKKURIN legði herðslu á hetta mál, tí flokkurin metir hetta at vera ein ríkan møguleika fyri okkum. Flokkurin royndi leingi at fáa menn at sýna hesum samfelagsøki ans, uttan at nakar vildi kennast við tað. Einasti møguleikin var tí at tað almenna vísti vegin — og tá fór at bragda.

TEIR PRIVATU eru nú vaknaðir við kaldan dreym. Nú ræður bert um at drepa spíran áðrenn hann reiðiliga er komin fyri seg. Sambandsflokkurin er amboðið, og hevur longu nú givið fyrstu eitursprænuna gjøgnum fremsta penn sín. Ja so roynast menn tá hevndarhugurin er fremri enn samfelagssinni.

DAPRAR OG DIMMAR sýnast framtíðarvánir okkara nú kapitalistiski jarnhælurin fer at traðka tey framtakshugaði tiltøk hjá fráfarandi landsstýrinum undir fót.

At eiga eina húsalon má vera lívsins rættur

Tað eru tey, ið lítlan pening eiga — tær ungu veiku herðarnar í samfelagnum — ið mugu merkja hendan ringa, rotna, kapitalistiska tannandan, sum rýkur á ungum fólki í dag í neyðstøðu, sum royna at seta bein undir egið borð, men ikki hava ráð til tess.

Rópini frá tí yngra liðinum um grundstykki, um hús — snøkt sagt tak yvir høvdið — harðnar í hvørjum. Hesi gerast alt fleiri og fleiri og tað gerst torførari og torførari at fáa »eitt ból«, so tilveran gerst tryggari, meðan ferðast verður her á fold.

Tað yngra liðið skal føra slektina viðari — tað eru tey, ið byggja skulu landið. Men at fáa tak yvir høvdið — umstøður at búleikast í, er fyri mong av teimum torførir stiggjar at fara uppum. Hervið máast lívsmótið — føra slektina viðari, byggja landið. Tikkar sum ein illa trekt klokka. Hví?

Mong fólk hava tey seinastu árini sett pening í fastar ognir. Í hesum ráki verður sagt, at hann ella hon eiga hús her og hús har — ja, enntá størri og minni lonir uttanlands eisini:

Eigur tú fasta ogn, fæst inntøka, sum lítið og einki skal gjaldast av til tað almenna. Tá ið komið verður at tirnuni er hetta innflættað: Tann maður ella kvinna — tey arbeiðandi, sum hava skapað teir lutir í t.d. eini hús eru upp bygd av, fáa lítlan og ongan vinning úr hesum fyritaksemi. Meðan tann, ið eigur ognina hevur sett pening í ognina — fær vinningin burtur úr hesum lutum — uttan so mikið at hava lyft hond frá síðu at skapa hesar lutir.

Tann største uppsparing, ið fer fram, er ognar vinningur — vinnuligur av fastari ogn. Í Danmark er hon 2/3 av allari privatu, nominellu nettouppsparingini!!! Lukkuligur er hann ella hon, ið eigur húsini tvey ella trý. Ólukkuligur er hann ella hon, ið hvørki eiga moldarklump og enn minni okkurt at verma seg ímóti vindi regni og »kulda«.

Tað eru strang kor, ið tað yngra liðið má ganga undir fyri at fáa »moldarklumpin«, so setast kann bein undir egið borð: Lang biðitíð eftir grundstykki — ovurdýrt grundstykki dýr lán — og harvið dýrt hús. Eitt jótur, ið er skapað av teimum, ið eiga realkapitalin. Teir, ið t.d. selja hús, lata tey ikki fara til tey, ið minni eiga, men føra ognina — kapitalin — til tey, sum eiga pening.

Tey ungu, mugu kenna koyrilin av hesi gongd. Tað eru í teirra kommunum, at kapitaleigarin rótar; um so hetta er í høgari húsaleigu, vanligari sethúsabygging ella sethúsasølu.

Vinningurin av fastari ogn hevur í mong ár skundað undir inflationina. Tann, sum eigur ognina, og fær vinning burtur úr henni, fær møguleikar at brúka meira. Tey eru við í hesi ævigu kapping um forbrúk sum samfelagið gevur teimum, og harvið er ognarvinningurin við til at seta trýstið upp á hesi kókigrýtu, sum eitur forbrúk og verri vera gjaldsváninar í sjálvari uttanlandsskuldini.

Tað eru tey, ið lítlan pening eiga — tær ungu veiku herðarnar í samfelagnum — ið mugu merkja henda ringa, rotna kapitalistiska tannandan, sum rýkur á ung fólk í dag í neyðstøðu, sum royna at seta bein undir egið borð, men ikki hava ráð til tess.

Teir kapitalistisku húsareyðrænarnir trína dansin sum ongantíð áður í teirr Soria Moria slottum og gera tað torførari og torførari hjá ungum fólkum at fáa tak yvir høvdið. Mátti hin altvaldandi eisini rátt her so øll, øll her á landi komu undir tey vanligu mannarættindini: at liva og virka undir ódýrum lonum so lívið gjørdist ein rættur — ein lívsins rættur í lukkuligum umhvørvi og góðum samfelagstónalagi í allar ættir.

Frits Johannesen

Vandin við Sambandsflokkinum

Seinastu dagarnar er nógv gjørt fyri at fáa fólk at trúgva, at Javnaðarfl. fremur kommunismu — t.v.s. ger Føroyar til eitt kom. land. Pauli E. gekk so langt í síni villeiðing, at hann ger kom. Polen til eitt sos. land, tí hann veit, at orðið sosialistiskt verður millum fólk her heima brúkt javnt við javnaðarpolitikk ella sosialdemokratar.

Pauli hevur fyrr avdúkað seg polittiskt. Hugsa bert um eitt tað seinasta, tá hann segði at var Jógvan Olsen fiskimálaráðharri, so var fiskivinnupolitikkurin endaliga loystur. Hetta sjálvt um fiskivinnan í dag er í støðugari útvikling. Pauli E., sjálvt danski fiskimaðurin, sum skuldi verið betur fyri enn okkara fiskimaður, veit ikki, hvar hann skal veiða í morgin.

Polen sos. ella kom.

Fría fakfelagið í Polen verður tvungið at góðtaka leiðandi støðuna hjá kom. fl. í Polen. Einasti loyvdi flokkur í Polen er kom. fl. Pauli E. trýr at polski kom . fl. stjórnar einum sosialistiskum Polen. Tvætl!

Polen er limur í KOMINTERN og ikki Sosialistiska Internationala. Lat meg nevna, at so góður javnaðarmaður sum Willy Brandt er formaður í Sosialistiska Internationala. Og enn trýr Pauli E. at Polen er eitt sos. land. Nei, Pauli, lygn og aftur lygn.

At tað kostar at verða javnaðarmaður, tað vita vit. Bestu dømir eru at finna hjá fyrimyndini hjá Paula E. 1. Einastu menn, ið atkvøddu ímóti, tá Hitler tók sær alt valdið persónliga í Týsklandi, vóru javnaðarmenn. 2. Willy Brandt og aðrir javnaðarmenn máttu rýma úr landinum fyri politikk sín.

Tí Pauli, nyttar ikki at ræða við javnaðarmonnum. Hesir eru einastu menn, ið kunnu verja móti sambandsflokkinum og kommunismuni. Politikkur sambandsins fremur kommunismu — jfr. lond sum Rusland — Afghanistan — Etiopia og onnur kom. lond, ið vórðu stjórnað eftir somu uppskrift, sum Sambandsflokkurin arbeiðir eftir.

Nei Pauli E. er sanniliga okkara polittiski **biomatur**. Hvar er tín umbering um Polen? Tí Pauli E. tú leyg um Polen.

Jallur

Ikki til fánýtis

Ikki kann sigast annað enn, at við javnaðarfloksins luttøku í Tórshavnar býráð er hent nógv.

Vit kunnu´ byrja við oljutangunum. Tað var í 1970, at oljufelagið Esso søkti um at leingja sáttmálan í so og so nógv ár, men tann einasti, sum striddist í móti, var Jona Henriksen, táverandi býráðslimur javnaðarfloksins.

Havnarfólk, hvørjum líkist tað, at oljutangar skulu standa so tætt við hús? Ongum!

Okkara menn mugu virka fyri, at teir verða fluttir ongatíð ov skjótt. Allir hinir runnu á leistunum fyri hesi multinationalu, kapitalistisku fyritøkuni.

So koma vit til SMS. Í samband við tað málið, mæltu javnaðarmenninir í býráðnum heldur til at geva handilsmonnum í býnum byggiloyvi, soleiðis at ein minni handilsbýlingur við gøtum og torgum í millum kundi byggjast, í staðin fyri núverandi loysn, sum ikki bara hevur havt hepnar fylgjur.

Eitt tað besta, hetta býráðið hevur gjørt, er Bussleiðin. Tað er tekniska deildin hjá býráðnum, sum skilagott hevur skipað fyri. Nevndarformaður er Jákup Sune Jacobsen úr javnaðarflokkinum, sum veruliga hevur fingið skil á alt tað tekniska.

Hin býráðslimurin, Leivur Johannesen, hevur eisini roynst væl. Hann hevur fingið nógv burtur úr á tí sosiala økinum, men vóru tað fleiri javnaðarsinnaðir menn í býráðnum, so er einki at ivast í, at vit vóru komin nógv nærri eini loysn á dag-

Framhald á síðu 7